## Stjørnan í eldin

Fríggja- og leygardagin skal kvinnuliðið hjá Stjørnuni spæl Europa-Cup dystir í hondbólti móti Slovan Duslo úr Slovakia. Hetta er næsta árið á rað, at Stjørnan tekur lut í Europa-Cup. Í fjør var enntá heilt nær við, at klaksvíkarkvinnurnar vunnu seg víðari, tá tær spældu móti meistarunum úr Montenegro.



## Hepnir italiumenn

Tað var um reppið, at Cypros skapti eina meira enn hálva sensatión, tá teir á heimavølli spældu móti Italia. Stutt fyri leiklok stóð 1-1 á máltalvuni, men í evstu løtu eydnaðist Italia kortini at skora sigursmálið. – Vit fingu meira, enn vit høvdu uppiborið. Vit vóru beinleiðis hepnir við hasum úrslitunum, tí spæl okkara sannførdi als ikki um, at vit skuldu hava trý stig fyri dystin, segði italski landsliðsvenjarin, Marcello Lippi, við italska Sky eftir dystin.

## Mátti hoppa høgt

**Egil á Bø hevði sínar trupulleikar av risastóra Zigic, men hann helt kortini, at føroyska liðið stóð royndina í Beograd**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við nærum 30 hitastigum var talan um mest sum ómenniskjansligar umstøður hjá føroysku spælarunum á Crvena Zvezda leikvøllinum í Beograd, og Egil á Bø ásannaði eisini, at hetta var hart.

- Vit vóru jú støðugt undir trýsti, ov vit mistu sera nógva vætu, so tað var hart at koma ígjøgnum.

*Og tú hevði ein stóran mann at dystast við í Zigic?*

- Ja. Har vóru ikki nógvir luftbóltar, sum eg fekk fatur á. Tað ráddi meira um at órógva hann, tí bóltar komu innfyri, tí tað er nokk ikki hugsingur um at hoppa somikið høgt, helt Egil.

*Men 2-0 í Beograd. Tað er væl eitt úrslit, sum er til at liva við?*

- Ja. Tað er tað nokk. Sjálvandi er talan um tvey óluksáliga keðiligt mál, sum teir fáa. Men vit høvdu avtalað, at fyrst og fremst skuldi arbeiðsinnsatsurin vera í lagi, og tað lyftið hildu vit. Tað eydnaðist okkum eisini at taka ferðina úr dystinum, sum vit høvdu ætlað, og so mást tú eisini vera realistiskur. Eitt 2-0 tap her niðri er ikki verri enn ilt, og tað var nokk ikki óuppiborið, at teir vunnu, staðfestir Egil.

# Spælararnir svaraðu aftur



*Jógvan Martin Olsen í holt við geva instrukis til Christian Høgna Jacobsen undir dystinum í Beograd*
*Mynd: Aleksandar Djorovic*

**- Eg havi sagt, at eg saknaði eitt sindur av offurvilja, og eg haldi, at spælararnir svaraðu mær aftur, segði ein nøgdur landsliðsvenjari eftir dystin leygardagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt tap í sjálvum sær er sjáldan nøktandi. Men hóast hetta, so var Jógvan Martin Olsen ikki nakar ónøgdur maður, tá vit fingu orð á hann í Mixed-zone økinum uttan fyri Crvena Zvezda stadion í Beograd.

- Tað, sum vit settu okkum fyri undan ferðini var, at vit skuldu endurvinna nakað av virðingini fyri landsliðið. Eg havi sjálvur sagt í samrøðu við Sosialin, at eg saknaði nakað av offurvilja, og tað haldi eg, at spælararnir svaraðu mær aftur á best hugsandi hátt í dag, segði Jógvan Martin Olsen.

*Og taktiska uppleggið tóktist eisini at rigga?*

- Ja. Vit royndu hasa skipanina í Portugal, og nú hava vit so havt nakrar venjingar afturat. Tíbetur kundu vit stilla við at kalla somu verju í dag. Fyrimunurin í hesi leikskipanini er, at økið, sum einstaki spælarin skal verja, verður minni – væl vitandi um at vit tá eisini missa nakað uppi á vøllinum. Men á útivølli móti Serbia vita vit væl av, at tað verða ikki vit, sum stýra dystinum.

*Tað sá eisini út til, at avgerðin um at flyta Christian Høgna inn á miðvøllin hjálpti til at skapa nakað frameftir?*

- Ja, tað var tað alternativið, sum vit høvdu í mun til dystin í Portugal. Og Christian Høgni var øgiliga raskur at stuðla Andrew, og so má eisini siga, at Andrew so sanniliga eisinin svaraði mær aftur, nú hann als ikki hevur verið í hópinum.

*Sum tú nevnir, so komu tit sjáldan nóg langt niðan. Og einar tríggjar ferðir eftir steðgin komu tit upp í síðunum, men noyddust at venda, tí eingin var í feltinum. Tað er væl eisini nakað, sum arbeiðast skal við?*

- Bæði og. Tað vóru nakrar spælarar, sum í steðginum tosaðu um, at orkan var við at ganga undan. Atli kendi eisini onkran smáskaða, so avtalan varð, at vit máttu minimera arbeiðsøkið, og tað var orsøkin til hetta.

*Men tú framdi bara eina útskifting. Vildi tað tá ikki verið rætt at skift meira út?*

- Tekur tú dystin í Portugal, so skifti eg nógv út tá. Tað gjørdi eg fyri at síggja nakrar spælarar royna seg, hóast summi tá fýltust á, at eg framdi ov nógvar útskiftingar. Tað kann sjálvandi órógva rútmuna í spælinum, um so er, og tí vildi eg ikki skifta ov nógv, sigur Jógvan Martin Olsen.

SEV
www.sev.fo

Endurlýsing:
**MASKINMEISTARi til Fossáverkið**

Eitt starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna er leyst at søkja til setan skjótast til ber. Talan er um avloysarastarv fyri maskinmeistara í farloyvi, og verður setanin tí tíðaravmarkað til 1. juli 2009.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Á Fossáverkinum eru 2 turbinur upp á tilsamans 6,4 MW. Undir Fossáverkinum hoyra eisini niðan fyri standandi vatnorkuverk og vindmyllur, sum verða stýrd frá Fossáverkinum:

- Mýruverkið við einari turbinu upp á 2,4 MW
- Heygaverkið við einari turbinu upp á 4,8 MW
- Eiðisverkið við tveimum turbinum upp á tilsamans 13,4 MW
- Vatnturbinan á Strond upp á 1,4 MW
- 4 vindmyllur í Neshaganum upp á tilsamans 2 MW.

Talan er sostatt um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat og 4 vindmyllur við einum samlaðum mátti upp á 30,4 MW.

Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling).

Eisini er vakthavandi á Fossáverkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv, 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv og royndir innan økið.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá prógvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pól Joensen, verkmeistara á tel. 346800.

Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum vera SEV í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. sept. 2008.

ELFELAGIÐ SEV · POSTSMOGA 319 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SEV.FO · SEV@SEV.FO